## DAGSINS MEINING

# Dupult moralur og hykl!

Vit hava eitt áhugavert orðaskifti í løtuni á fleiri mótum. Men samstundis sum orðaskifti er áhugavert, so er tað eisini bæði tragikomiskt og óhugnaligt. Skulu vit hava lóggávu um skrásett parlag? Hava vit loyvi at senda víðari sjónvarpsrásir við pornografiskum innihaldi? Og skulu vit hava loyvi at lýsa fyri øli eins og allir miðlar, sum floyma inn yvir okkum?

Ella skulu vit halda fram at bjálva okkum inn í dupultmorali og dyrka tað serføroyska hyklið? Ja, skulu vit skipa føroyska samfelagið við forboðum og avmarkingum eins og Ayatollastýrið gjørdi í Iran og Talebanstýrið gjørdi í Afganistan, sum ein lurtari viðmerkti í kjaksendingini í Útvarpinum týsdagin?

Tað seinasta málið, sum er komið upp í forboðs-orðaskiftið, er lýsingar um føroyskt øl. Orsøkin er, at annað bryggjaríið er dømt at gjalda eina bót fyri ólógliga rúsdrekkalýsing. Harafturat er hitt bryggjaríið og ein klubbi skuldsett fyri lýsingar, sum kanska ikki eru røttu megin markið.

Spurningurin er so, um hesi rættarmál fáa nakrar avleiðingar ella ikki. Skulu vit gita, so halda vit fram við dupultmoralinum og hyklinum, og tað merkir:

- Vit kunnu keypa útlendsk dagbløð, tíðarrit ella vikubløð, sum hava lýsingar fyri øli, víni ella brennivíni. Vit kunnu taka eitt ótal av sjónvarpsrásum niður, sum hava lýsingar fyri øli o.s.fr. Men føroysk bløð og føroyskir loftmiðlar kunnu ikki hava slíkar lýsingar. Og føroysku bryggjaríni, klubbarnir ella innflytarar kunnu hvørki lýsa í Ekstrablaðnum, Samvirke ella í TV 3, tí tað hava tey ikki møguleikar fyri ella ráð til.

- Tí skulu hesi nevndu lýsarar framhaldandi leggja høvdið í blot og vísa hugflog og dirvi, tá tey skulu lýsa og boða frá sínum vørum. So er aftur spurningurin, um lýsingarnar eru hesumegin ella hasumegin lógliga markið. Og spurningurin er eisini, hvar markið gongur, tí seinasti dómurin er ikki sørt ørkymlandi. Eftir honum er orðið "øl" á eini svintu í eini keiputekning nóg mikið til, at dómarin kom til ta niðurstøðu, at lýsingin var ólóglig.

Tey flestu eru helst samd um, at vit øll - ella samfelagið - skulu royna at avmarka rúsdrekkanýtsluna, hóast okkum dáma væl at hugna okkum við eini øl ella víni afturvið einum góðum bita, ella einum sjussi eitt kvøld í sofuni ella í veitslulagi.

So er aftur spurningurin, um loyvdar lýsingar eru í andsøgn við ein yvirskipaðan politikk at avmarka rúsdrekkanýtsluna ella ikki? Tað er ein spurningurin, vit ongatíð gerast samd. Heldur ikki kunnu vit semjast um, um vit skulu loyva øl- ella vínlýsingum í Føroyum. Hesum forðar dupultmoralurin eisini fyri - bara lúsin útlendsk erIII

Eitt kunnu vit kanska semjast um, og tað er, at lýsingarparturin í rúsdrekkalógini er ikki nóg greiður, og at neyðugt er at broyta lóggávuna á økinum. Sambært tí seinasta, sum er komið fram, kann ein miðil umrøða øl og vín - sum ein hotellmaður gjørdi í Okkara Kokkum herfyri bæði væl, leingi og virðiliga - men eitt bryggjarí ella innflytari hevur bara ikki loyvi at gjalda fyri tað.

Dupultmoralur og hykl í so stórt mát, at tað er stríð við allan logikk og vanligt skil!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Løgmálaráðharri – aftur í 80-ini

**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*



Bankar, Sparikassar og Elektron hava arbeitt. Við at gera eina avtalu við PBI um eina gjaldsskipan, har kundin verður betri upplýstur enn nú. Lógin heimilar hesi avtalu.

Helst orsaka av einum innibygdum danahatri, hevur Høgni Hoydal ilt av hesi samstarvsavtalu ímillum stovnar í hesum báðum londum. Í besta 80-ara stíli blandar hann seg uppí, hvat vinnan SKAL gera. Tí er ætlanin í eini kunngerð, at forbjóða hesum samstarvi.

Er tað rætt, at politikarin beinleiðis blandar seg uppí, hvat vinnan ger? Er tað ikki politikarin, íð skal geva vinnuni góðar karmar at arbeiða undir.

Tað kann ikki vera rætt, at primitiv politisk instinktir skulu avgera, hvussu Elektron skal handfara síni viðskiftafólk. Tað eigur at vera rationelt grunda. Og hesa meting eigur vinnan at gera. Ikki Høgni Hoydal.

Eg vóni, at løgmaður ella Løgtingi steðga Høgna Hoydal - í hansara 80 ara politikki. Sum í hesum føri, tíverri bert tykist grundaður á nationalistiskt antipati ímóti dønum.

# Hr. Ludvigsens fornemmelse for sne

**Páll Poulsen**



Tak for svaret, men det betyder dog ikke, at du har forstået en tøddel. Hr. Zacharias Wang har behandlet folkeafstemningen allerede i midten af tresserne. Men det var altså den rent "etymologiske" betydning af ordet "løsrivelse" jeg talte om. Hvad er det for en størrelse, der skal løsrives fra hvilken? St. Vincent Grenadinerne "løsrev" de sig fra Storbritannien? Eller Djibouti, "løsrev" de sig fra Frankrig? Norge "løsrev" de sig fra det danske rige osv. Halland, Blekinge og Skåne blev faktisk "afstået", hvor behændigt kan man ikke sige det?

Hvad der rent faktisk er sket, er ikke noget nyt her til lands. Hvad med lidt "consensus", hvad er det, vi her taler om? Hvorfor er det så vigtigt, at flertallet var "spinkelt", og at der i den videre nullificering "kun" var tale om 32.5 prosent af de stemmeberettigede? I USA er det almindeligt, at kun 38 prosent møder op ved urnerne til præsidentvalg. USA har næsten 300 millioner indbyggere. Så her er dit microscoop uden sammenligning helt hen i vejret. Hvorfor er det så vigtigt at pointere, at der ved den "vejledende folkeafstemning" "kun" var mødt 67,5 % af de stemmeberett-igede? Prøv en gang og kalkuler marginen ved Kennedys valg i 1962 og Bush stemmer år 2000, så kommer du til at fornærme det meste af Nord-Amerika.

Men værst er det ved "hjemmestyreloven", der kun er en delegationslov, (udstedt af Kongen), den kollapsede helt og holdent i 1992. Denne groteske lov bliver ikke opgraderet, fordi så ruller banktilsynet ud af skabet, ikke sandt?

I øvrigt er det mere spændende at se på, hvad der er sket over et større spektrum og en længere tidshorisont. Hvem er regeringens venner på Færøerne, og hvor meget koster "vennerne" den danske stat i kroner og ører? Hvorfor mon Thorstein Petersen røg i spjældet, mens hans kollegaer undslap fængsel? Hvori består den danske consensus, det kunne være interessant at vide? Bare for en ordens skyld.

# Fakliga innihaldið og pedagogikkin

**Pauli Nielsen**



Fólkaskúlin er á skránni hjá Útvarpi Føroya í vetur, og tøkk eigur útvarpið fyri tað.

Sendingarnar verða fleiri og tretivu í tali, so nógv ymisk viðurskifti og nógv ymisk sjónarmið kunnu koma fram.

Aðrir fjølmiðlar hava eisini sýnt áhuga fyri skúlanum.

Eitt, sum komið er fram í fleiri førum, er ein mótsetningur millum fakliga innihaldið í skúlanum og pedagogikk.

Síðan hetta er komið upp, havi eg hugsað nógv um hesa uppseting, sum summi tykjast at vilja gera til høvuðstrupulleikan í dagsins skúla.

Eg má siga sum er, at eg skilji ikki hesa andsøgn.

Kenni tí trongd til at spyrja, hvussu henda andsøgn sær út í huganum hjá teimum, sum vilja vera við, at pedagogikkin stendur í vegin fyri dyggum fakligum støði í fólkaskúlanum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Eingin er fullspottaður, fyrr enn hann hevur spottað seg sjálvan

**Jean Dimon**



Hetta var tað fyrsta, sum rann mær til hugs, tá eg hoyrdi landsstýrismannin Bill Justinusen úttala seg til sjónvarpið týskvøldið. Landsins hægsti maður í heilsumálum ákærdi allar føroyingar, sum eru sjúkir ella í komandi døgum eru fyri tí vanlagnu at gerast sjúkir og ikki kunnu viðgerast her heima, fyri kosta alt ov nógv.

Heilt erligt Bill Justinussen. Danir siga: Gå hjem og vug.....

### Valskráin

Ætla politisku flokkarnir í Føroyum at standa rætt, meðan ein landsstýrismaður og flokkur spælur politikk, tí annað kann tað ikki kallast.

Ferð eftir ferð hoyra vit um eykajáttanarlógir tá ferjur, vegir, tunnlar v.m. skulu gerast, men nú verður rópt varskó, nú FAMILIAN er komin í vanda, tí onkur í familjuni "kostar" ov nógv.

Var familjan ikki í hásæti í tíni valskrá Bill Justinussen??????

Hvat ætlaði tú tá tí sjúka familjuliminum??????????

### Mammon vann

Um hetta er ein roynd at sleppa undan at detta í gloymskurnar hav, so er ikki neyðugt, tí tú verður mintur fyri fleiri aðrar sakir. Hotel Tórshavn í Keypmannahavn, sum eitt ella annað skuldi gerast við. Sjálvur vart tú har niðri og sá skilið OG LOVAÐI bata.

Úrslitið var E I N K I, tí leigusáttmáli var gjørdur fleiri ár fram í tíðina, so Einki kundi gerast við ein ónýtiligan bygning. Visti tú ella stýrið hjá tær ikki hetta áðrenn tú fórst til Keypmannahavnar? Í hesum føri hevði Familjan og trivnaður hennara einki at siga. MAMMON VANN. Her skuldu føroyingar lært av 3. partinum í ríkinum, grønlendingunum.

### Góðska og tryggleiki

Seinastu árini er lønin hjá løgtings- og landsstýrisfólkum hækkað munandi, fyri at tryggja góðsku, og tí at arbeiðið er so krevjandi, men er hetta úrslitið, so Gud náði tann neyðars føroying sum gerst ella er sjúkur og ikki kann fáa læknahjálp í Føroyum, tí ikki er vist, at peningur er til læknahjálp.

### Sjálvstýrið og frælsi

Landsstýrið tosar um sjálvstýrið, og Hann hjálpi tú mær, um teir ikki loyva sær at taka FRÆLSI í sín munn. Hetta má so bert galda tey, sum nú og í framtíðini eru frísk ella hava møguleika at fara til útlondini og gjalda sjúkrahúsrokningina sjálvi

Hvør mátti vera við at gjalda ferðina hjá Bill til Keypmannahavnar at kanna Hotel Tórshavn? Kanska hann, sum gerst sjúkur í nærmasti framtíð og hevur fyri neyðini at fara uttanlanda at søkja sær læknahjálp? Pápin í sjónvarpinum var uttan iva við.

### Ein maður er ein maður

Í dag, novembur 2002, er ikki nóg mikið við kenslubornum rópum sum : Móti samkyntum skrásettum parlag! NEI, kom út úr skápinum og vís, at familjan og trygleiki hennara og hjá einstaka føroyinginum hevur alt at tíða í tínari verð og krev á eini eykajáttanarlóg neyðugan pening, tí eingin kann í ár við vissu siga, hvussu nógv er neyðugt næsta ár á hasin økinum.

Er hetta ikki Løgtingsins vilji, Set so landstýrissessin í veð. Tá hevur tú staðið sum ein maður við títt orð. Annars???????????

Trygdin hjá tí einstaka føroyinginum og familjuni er tað verd.

Við vón um tryggleika hins einstaka og familjurnar.

# YVIRLÝSING

Í sambandi við rættarmálið ímóti okkum fyri brot á Rúsdrekkalógina segði Finn Ougaard, Varafúti, at Restorffs Bryggjarí hevur meldað Føroya Bjór fyri brot á somu lóg.

Hetta er sjálvandi ikki veruleiki og vit fara at heita á Finn Ougaard um alment at avsanna henda pástand.

Føroya Bjór er ein seriøsur samstarvsfelagi hjá Restorff Bryggjarí og vit harmast um slík skeiv tíðindi sum bert kunnu skaða tað góða samstarvið hjá bryggjaríðunum báðum.

**RESTORFFS BRYGGJARÍ**

# Jens Pauli Heinesen 70 ár

**TÍÐINDASKRIV**
*Føroya landsbókasavn*

Í sambandi við at okkara virknasti, núlivandi rithøvundur, Jens Pauli Heinesen, verður sjeyti, skipar Landsbókasavnið fyri almennari heiðursløtu á Landsbókasavninum sunnudagin 10. november, kl. 16.

Á skránni verður upplestur og sangur, umframt hetta verða kvøður bornar fram. Føroya landsbókasavn letur samstundis upp eina stóra handrita- og bókaframsýning, har roynt verður at geva eina mynd av rithøvundavirkseminum hjá Jens Paula Heinesen.

Jens Pauli Heinesen hevur í nógv ár latið Landsbókasavninum handrit síni í varðveitslu.

Á framsýningini verður høvi at síggja eitt úrval av hesum handritum - bæði prentaðum og óprentaðum. Umframt handrit verða eisini brøv, myndir o.a. at síggja.

Framsýningin verður opin til 1. februar næsta ár.

# Frystur blokkur, skattalætti og ein vaskikona

**Helgi Abrahamsen**



Í farnu viku fréttist, at tað er eydnast landsstýrinum at tryggjað sær, at blokkstuðulin ikki minkar, fyrr enn í fyrsta lagi, tá hetta valskeiðið er runnið. - Hetta er ótrúligt !

Fullveldislandsstýrið, sum sat frá 1998 til 2002, er tað landsstýrið av øllum landsstýrum, sum hevur móttikið flestar krónur úr danska statskassanum.

Sjálvstýrislandsstýrið, sum tók við í juni 2002, er fyrsta landsstýri, sum longu tað fyrsta árið í valskeiðinum hevur tryggjað sær, at blokkstuðulin ikki minkar í fýra ár.

Hetta er ótrúligt, tí júst hesi bæði landsstýrini (sum stórtsæð eru mannaði við somu flokkum), hava nú í hálvtfimta ár trúttað niður í føroyingar, at blokkstuðulin er av tí ónda.

- Ikki tí - sum sambandsmaður frøðist eg um, at tað nú eisini er gingið upp fyri øðrum flokkum, hvussu skilaleyst tað er at frásiga sær eina trygga inntøku.

### Hvar fór skiftistíðin

Tá yvirtøkulógin varð viðgjørd í Løgtinginum varð sagt, at trupulleikin hjá landsstýrinum var, at danska stjórnin vildi bara gera avtalur um blokkstuðulin fyri eitt ár í senn. Av hesi orsøk bar ikki til hjá landsstýrinum at leggja skiftistíðina yvir til ein sjálvberandi búskap til rættis. Men nú hava danska stjórnin og landsstýrið kortini gjørt avtalu fyri fýra ár, so nú skuldi tann trupulleikin verið beindur av vegnum. Men nú torir landsstýrið ikki at minka blokkin meira, tí hóast føroysku skattainntøkurnar eru methøgar, so røkka tær koritini ikki til nakra skiftistíð.

### Vaskikonan á Vesterbro

Vit hava mangan hoyrt frá loysingarflokkunum um stakkals "vaskikonuna á Vesterbro", sum av sínum hærtvunnu krónum má rinda skatt, sum danska stjórnin sendir víðari til Føroya sum blokkstuðul.

Men hvat ger sjálvstýrislandsstýrið? Teir fastfrysta blokkin (tryggja sær, at vaskikonan vaskar í minst fýra ár afturat), meðan teir við hinari hondini lova føroyingum skattalætta. - Ella fyri at brúka teirra egnu myndatalu: Danska vaskikonan skal gjalda føroyska skattalættan!

Eg eri samdur við landsstýrinum í tí, at tað er ikki ráðiligt at minka blokkstuðulin, nú fíggjarlógin ikki fæst at hanga saman. Men hvussu Sjálvstýrislandsstýrið so ætlar at geva føroyingum skattalætta sum skal fíggjast við sparingum á somu fíggjarlóg, tað er mær ein gáta.

- Men blokkurin er tryggjaður
- skattalættin er væl á veg
- so danska vaskikonan má royna at hanga í sum frægast.

# Nú skulu øll prutl hava nummarplátu

**PRUTL**
*Tíðindaskriv*

Vinnumálaráðið hevur avgjørt, at eftir 1. november í ár, skulu øll prutl verða skrásett í Akfaraskránni og hava fingið eina nummarplátu. Nummarplátan er minni enn bilnummarplátan og hevur bókstavir og tøl, sum eru grøn á liti.

Í ferðslulógini verður sagt um prutl, at tað er eitt motorakfar á tveimum ella trimum hjólum, hvørs slagvolumen ikki fer upp um 50 cm3 ella við elmotori, og hvørs motorur ikki kann fáa akfarið at koyra skjótari enn 30 km/t eftir sløttum.

Nýggj prutl, sum á fyrsta sinni verða tikin í nýtslu, skulu áðrenn tey fara út á vegin at koyra, góðkennast og skrásetast á Bileftirlitinum. Vanliga er tað sølumaðurin, ið tekur sær hesum fyri viðskiftafólkið. Prutlið skal verða tollavgreitt og tryggjað, áðrenn tað kann verða skrásett og fáa nummarplátu.

Brúkt prutl skulu verða skrásett og hava fingið nummarplátu áðrenn 1. juli 2003, men heitt verður á fólk um, at fáa hetta gjørt so skjótt sum gjørligt.




Hetta kann verða gjørt við at venda sær til prutlinnflytara ella verkstað, sum Bileftirlitið hevur gjørt avtalu við, um kanning av brúktum prutlum, fyri at vita um tey eru lóglig og lúka krøvini um tilgerð av prutli og útgerð tess.

Tá kanningarváttanin er tøk, kann prutleigarin venda sær til Bileftirlitið fyri at fáa prutlið skrásett og fáa eina nummarplátu. Prutlið skal verða tryggjað og prógv fyri galdandi trygging latið inn saman við kanningarváttanini.

Kanningin kostar 350 kr. og nummarplátan 250 kr.

Um spurningar eru um mannagongdina fyri skráseting av prutlum ella hvat fyri verkstað ella innflytara ein kann venda sær til, eru viðskiftafólk vælkomin at seta seg í samband við Bileftirlitið á telefon: 350400 ella 350416, telefax: 350401 ella teldupost: ossurj@bef.fo., sigur Bileftirlitið í tíðindaskrivi.